# Michael Matras 70 ár

Tað var ikki fyrrenn, at hann í vikuskiftinum hevði lítla tøkk í blaðnum, at vit gáaðu um, at vinmaðurin, Jógvan Michael Matras, á pálsmessu, 25. januar, fór um tey 70. Tá var hann í Danmark hjá systrini.

Í huga og verki er tað einki, sum boðar frá, at Michael er komin so høgt upp í árini.

Michael er ættaður úr Klaksvík, men hevur djúpar røtur norður til Viðareiðis, ið hann eisini kennir sum sína heimbygd og altíð hevur vitjað og vitjar nógv. Foreldrini vóru bæði av Viðareiði. Pápin var Guttorm, sum var ættaður av Brekkumørk, og mamman var Elin Margretha født Joensen hjá Dala og ættað uppi við Garð.

Elin og Guttormur búsettust á Stongum, og tey fingu trý børn: Anna Elisabeth (1931), Bjarni (1934) og Michael (1937). Anna Elisabeth býr í Keypmannahavn, og Bjarni búði í Klaksvík. Nú eru longu fleiri ár síðani, at hann flutti foldum frá.

Eftir millumskúlan og realprógvið í Klaksvík fór Michael til Havnar, har hann leyk matematiskt studentsprógv í 1958. Eftir vikarstarv í heimbygdini fór Michael á Læraraskúlan, har hann tók prógv í 1962.

Í 1963 gjørdist Michael lærari í Klaksvík, og har tænti hann – burtursæð frá árunum tá ið hann var undir eftirútbúgving - inntil hann 1. august í 1997 fór úr starvi. Michael var deildarleiðari í Skúlanum við Ósánna 1976-80 og varaskúlastjóri í Skúlanum við Ósánna 1980-97. Eitt árið var hann settur skúlastjóri.

Michael var nærlagdur og dugnaligur lærari. Hann var ein av teimum, sum støðugt var undir útbúgving, bæði heima á landi og í Keypmannahavn. Longu meðan hann var undir læraralestri í høvuðsstaðnum, var Michael hjálparmaður á Náttúrugripasavninum og hjálparmaður í jarðfrøðiliga kortleggingararbeiðnum í Norðoyggjum.

Royndirnar saman við fleiri av fyrstu akademikarunum á Fróðskaparsetrinum bóru við sær, at Michael og fleiri av lærarajavnaldrum hansara fingu so holla útbúgving, sum tað skal leitast leingi eftir. Teir vóru serfrøðingar í øllum millum fjals og fjøru og í sjónum. Útbúgvingin og ikki minst góða sambandið til Viðareiðis munnu vera orsøkir til, at Michael er sjáldsama kringur í móðurmálinum. Michael hevur góðar skaldagávur, og tað er ikki evnaleyst rímsmíð, ið Michael havur lagt fyri dagin, tá hann hevur yrkt til ymiskar merkisdagar. Men slíkar gávur eru ikki fremmand í ættini. Farbróðurin var Chr. Matras.

Michael var býráðslimur fyri javnaðarflokkin 1977-1980, tá ið hann ikki stillaði uppaftur. Hann var skrivari í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag 1970-1973, eitt skifti nevndarlimur í KÍ og fyrst í seksti árunum skótaleiðari í Skótaliði Nólsoyar Páls, sum hann altíð hevur havt sera stóran áhuga fyri og tokka til.



Michael giftist 16. november 1963 við Torgerð fødd Johannesen. Torgerð vaks upp í Hoydølum hjá fastur síni Hannu og Vilhelm Magnussen, sum er kendur fyri sítt arbeiði at útrudda tuberklarnar úr Føroyum.

Torgerð og Michael búsettust á Stongum ella við Skáltavegin, sum hesin bústaðurin nú verður nevndur. Torgerð og Michael eiga tríggjar dreingir: Kim, Guttormur og Vilhelm. Teir búgva allir í Havn, og abbabørnini hjá Michael eru Sissal og Brandur.

Fyri nøkrum árum síðani fluttu Torgerð og Michael til Havnar, har tey búgva á Frælsinum.

Michael hevur altíð havt serliga stóran áhuga fyri seyði og seyðahaldi. Hann hevur havt trøð, og tað hevur verið satt balsam fyri hann at fáast við landbúnaðin.

Nógvir ungdómar í Klaksvík lærdu í seksti árunum Michael serliga væl at kenna í Klaksvíkar Talvfelag, sum hann endurstovnaði í 1967. Fyrst varð telvað í skúlanum, seinni í ovastu hædd í Føroya Banka, so í HF skúlanum og eingin frøddist meiri enn Michael, tá ið felagið flutti í húsini í Akursmørk.

Fyrstu árini hjá endurstovnaða talvfelagnum var mestsum bert talan um "lokala" telving. Vestmanna og Havnin vóru tá nógv tey sterkastu talvplássini í Føroyum. Men telvingin í Klaksvík mentist skjótt. FM sigrar felagsins hava síðani verið mangir, bæði fyri lið og einstaklingar. Eldsálir úr felagnum hava eisini sett sær høg mál. Einaferð fingu teir talvstórmeistaran Nicolic (hann var nr. 5 á heimsstyrkilistanum) at búsetast í Klaksvík, har hann var venjari í nærum eitt ár. Og seinni fingu teir ongan minni enn Kasparov til Føroya.

Michael fylgir væl við í øllum, sum gongur fyri seg í Klaksvík og Norðoyggjum, og ikki minst, tá ið hann fastur fúsur. Einki verður tikið frá nøkrum, tá ið vit siga, at hjartabarnið er talvfelagið. Tað er ikki so undarligt. Michael stríddist og eigur avgerandi lut í, at tað eydnaðist at fáa telvingina og talvfelagið at koma fyri seg.

Hjartaliga tillukku góði frændi!

**SJ**

**95 ár**

Føstulávintsmánadag fyllir Petra Samuelsen í Havn 95 ár. Dagurin verður hildin saman við børnum, ommubørnum og langommubørnum

**Dagurin**

**17. februar. Finandus**, deyður ár 603. Írskur abbati í kleystrinum Cloneenagh í Írlandi.

**18. februar. Concordia**, deyð umleið ár 250. Lítið kend halgikona í fornkirkjuni.

**19. februar. Ammon**, deyður umleið ár 250. Var ein av teimum rómversku hermonnunum, sum við at síggja dirvi og trúarvissu teirra kristnu, sjálvur gjørdist kristin og varð tikin av døgum.

Færøernes Mellem- og Realskole:

# Realskúlaprógv í 1916



*Hesi tóku realskúlaprógv í 1916.* ***Aftara rað f.v.:*** *Grøni-Marni, Danmark, Anton Djurhuus, Kollafjørður, Knud Nygaard, Martin Djurhuus, Tórshavn, og Evald Arge Tórshavn.* ***Fremra rað f.v.:*** *Jacob Jacobsen, Tórshavn, Haraldina, Vestmanna (gift til Hoyvíkar), Lina á lag, Tórshavn, og Jørgen Frants Jacobsen, Tórshavn. Aftan fyri á myndini stendur "Tórshavn, tann 20. juli 1916, Realeksamen". Um onkur hevur okkurt at viðmerkja í samband við hesa myndina, eru tey vælkomin at kontakta Jórunn.*

*Myndaeigari: Liss Rasmussen*

Í sambandi við eina framsýning sum verður á ólavsøku í ár í gamla realskúlanum í Havn leitar Jórunn Dánialsdóttir eftir myndum av lærarum og mæmingum í "Færøernes Mellem- og Realskole" í tíðarskeiðnum 1916 til 1966.

Jórunn heitir á tey, sum eiga myndir frá hesum tíðarskeiði, um at ringja til sín á tel. 316024 ella 226024. Myndirnar kunnu eisini latast inn "navnmerktar" í Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23 (tel. 314710).



# Helgi Midjord í Smiðjuni

Leygardagin 17. februar letur listaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík. Tað er listamaðurin Helgi Midjord úr Fuglafirði, sum fer at sýna fram 16 oljumálningar, ið hann hevur málað nú í heyst og vetur.

Til ferniseringina, sum verður leygardagin kl. 16, verður fólkatónleikur og klassiskur tónleikur eisini at hoyra.

Hjá Helga gera tær listarligu gávurnar seg nevniliga eisini galdandi innan tónleikin, so Helgi fer sjálvur at syngja og spæla nøkur løg, og harafturat fer Niels Midjord eisini at framføra nøkur løg.

Møguleiki er at síggja málningarnar hjá Helga til og við mikudagin 21. februar, tá framsýningin endar.